# Politikararnir hava slept okkum upp á fjall

**Handlarnir kunnu smyrja akkurát so tjúkt upp á vørurnar, sum teir vilja. Hetta rakar fyrst og fremst tey tímaløntu og pensjónistarnar, og tað hevur ongantíð havt so stóran týdning at hava eitt munagott príseftirlit. Men politikararnir hava fullkomiliga slept brúkarunum upp á fjall, sigur forkvinnan í Føroya størsta fakfelag**

PRÍSHÆKKINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Politikararnir hava fullkomiliga slept okkum brúkarum upp á fjall.

Tað staðfestir Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, nú Sosialurin hevur gjørt eina pránskanning í Føroyum og í Danmark, sum verður umrødd aðrastaðni í blaðnum.

- Nú kann staðfestast, at prísirnir eru farnir heilt yvir gevind seinastu tíðina og tey, sum hava skil fyri slíkum, meta eisini, at næsta árið fara matvøruprísirnir nógv longur upp afturat.

Men Ingeborg Vinther staðfestir eisini, at hóast prísvøksturin er so ógvusligur, sum hann er, hava føroyingar als onga skipan, sum verjir brúkararnar.

- Vit hava eitt kappingarráð, men tað nyttar lítið tí tað hevur so lítlar pengar at arbeiða við, at tað fær ikki fáa røkt sínar skyldu sum veruligir príseftirlit.

- Tí hava handlarnir fullkomiliga fríar ræsur at smyrja so tjúkt upp á vørurnar, sum tað passar teimum, uttan at nakað, sum helst eftirlit er við, um príshækkingarnar eru væl grundaðar ella ikki.

### Serliga hart rakt

Hon sigur, at hetta er ein gongd, sum rakar tey veiku í samfelagnum serliga hart.

- Hetta rakar serliga tey tímaløntu og onnur láglønt og so sjálvandi eisini pensjónistarnar og hesir bólkar fáa tað hart í næstu framtíð.

- Tað sær ikki gott út hjá vanligum verkafólki og tá ið árið er úti, vænti eg, at støðan verður vánalig nógvastaðni, leggur hon afturat.

Ingeborg Vinther átalar harðliga, at politikararnir ikki vilja taka stig til at verja brúkararnar betri.

Hon átalar harðliga, at politikarar eftir øllum at døma, hava slept ætlanini um at seta ein brúkaraumboðsmann, sum kann røkja áhugamálini hjá brúkarunum og hon átalar eisini, at politikarar ikki vilja seta eitt veruligt príseftirlit á stovn, ella at geva kappingarráðnum so mikið stóra játtan, at tað eisini fær virka sum ein effektivt príseftirlit á stovn.

- Vit eru fullkomiliga givin upp til skutil og tí er tað átaluvert, at politikarnir ikki vilja taka stig til at verja okkum.

### Keypiorkan má tryggjast

Men nú eru tað mong, sum føra fram, at brúkarin er sjálvur tann besti prísansarin og at kappingin er so hørð, at prísirnir verða hildnir niðri?

Hesum ivast Ingeborg Vinther í. Í øllum førum bera príshækkingarnar seinastu tíðina ikki boð um hetta.

Hon vísir eisini á, at hóast handlarnir eru nógvi ber til at gera avtalur um, hvussu nógv vørur skulu kosta. Tað fekst prógv fyri, tá ið ein rúgva av bakarum nakað síðani vórðu dømdir fyri at hava sett kappingina út av kraft, tí teir høvdu avtalað, hvussu nógv breyðini skuldu kosta.

Samstundis sum príshækkingarnar eru ógvusligar, er skipanin eisini avtikin, har lønirnar verða prístalsviðgjørdar, so at tær hækka, so hvørt sum prísirnir hækka.

- Sostatt er øll verja tikin frá brúkarunum og tað skilji eg ikki, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tað rætta hevði verið, at vit fáa eina skipan, sum tey hava í Íslandi, har tað er staðfest, at fara prísirnir upp um eitt vist, skal samráðast um sáttmálarnir av nýggjum fyri at byrgja upp fyri, at keypiorkan fellur.



Hon sigur, at arbeiðarafeløgini hava roynt at tala fyri eini slíkari skipan, men tað hevur verið ómøguligt.

- Men ein slík skipan skuldi verið gjørd sum ein trípartaavtala ímillum Arbeiðsgevarar, fakfeløg og landsmyndugleikarnar. Og taka arbeiðsgevarar ikki undir við tí, eigur tað at verða ásett við lóg, leggur Ingeborg Vinther afturat.

*- Tey tímaløntu og pensjónistarnir fáa tað ringt í framtíðini. Handlar kunnu skalta og valta við prísum sum teir vilja, men politikarar gera onki fyri at verja brúkaran ímóti órímiligum príshækkingum, staðfestir Ingeborg Vinther*

## Fer at hevna seg aftur í 2010

**Høvdu arbeiðarafeløgini vitað, at prísirnir fóru at hækka so nógv, høvdu tey ongantíð havt skrivað undir ein trý ára sáttmála, men tað fer at hevna seg aftur í 2010 ,**

PRÍSHÆKKINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Høvdu vit vitað hetta, høvdu vit aldrin gingið við til hendan sáttmálan.

Í dag viðgongur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, at hon angrar, at í fjør vár gingu við til at skriva ein nýggjan trý ára sáttmála við arbeiðsgevararnar, sum ikki kann sigast upp fyrrenn 30. apríl 2010.

Hon sipar til tær stóru príshækkingarnar, sum hava verið í seinastuni og sum vit umrøða aðrastaðni í blaðnum.

- Men sum ikki einaferð, vildu vit vísa samfelagssinni við at tryggja frið á arbeiðsmarknaðinum í heili trý ár. Men í dag mugu vit tíverri staðfesta, at vit hava fingið tað afturlønt í gráum kálvsskinni.

- Lønarhækkingarnar eru langt síðani upp etnar av príshækkingunum og sum útlitini eru fyri framtíðina, eru enn fleiri hækkingar í væntu, sigur Ingeborg Vinther.

- Sostatt er grundarlagið fullkomiliga máað undan sáttmálanum, sum varð gjørdur í fjør.

Hinvegin ásannar Ingeborg Vinther, at borðið fangar og sostatt er tað onki, sum arbeiðarafeløgini kunnu gera við støðuna.

Men hon staðfestir eisini, at tað er púra greitt, at arbeiðarafeløgini fara ikki aftur at gera ein sáttmála, uttan at fáa eina áseting um, at tað skal bera til at samráðast um lønirnar í sáttmálaskeiðnum um so er at fortreytirnar í samfelagnum broytast munandi.

### Hevnir seg aftur

Ingeborg Vinther sigur, at enn ber illa til at siga, hvussu gongdin fer at ávirka næstu sáttmálasamráðingarnar í 2010.

Men hon sigur, at tað er onki at ivast í, at arbeiðarafeløgini fara at royna at byrgja upp fyri, at vit fáa tað innaftur, sum vit hava mist í keypiorku.

- Tá ið næstu samráðingar verða, fara vit at gera nágreiniligar metingar av, hvussu nógv, keypiorkan er minkað og tað fara vit at krevja at fáa innaftur, staðfestir Ingeborg Vinther.

# Heimaba

*- Breyðini smakkar betri, eru bíligari, hava meira føðslu. Og so er tað sum við øllum øðrum, sum vit gera sjálvi: Vit vera meiri nøgd og sjálvbjargin sum menniskju av at skapa nakað og at síggja úrslit, sigur Bjørg Djurhuus*



**Hví keypa óhugnaliga dýru breyðini hjá bakarinum, tá tú sjálv/sjálvur kanst baka breyð, sum eru minst líka lekkur og nógva ferðir bíligari**

PRÍSHÆKKINGAR
*Dorit Hansen*
*Rigmor Dam*

Húsini fyllast av vælangandi og fjálgum anga av heimabakaðum breyði, og tú sparir fleiri túsund krónur um árið. Í nógvum føroyskum familjum eru breyðuppskriftir farnar í arv ígjøgnum fleiri ættarlið, men nógvar ungar barnafamiljur meta seg ikki hava tíð til at baka breyð hvønn dag.

Heima hjá Bjørg Djurhuus fáa tey heimabakað breyð hvønn dag. Uppskriftina hevur hon fingið frá langommuni, Fíu, og fyri Bjørg er tað púra náttúrligt at bakað breyð. Hon er triðja ættarlið í familjuni, sum matar familjuna við nýbakaðum breyði hvønn dag.

- Líka síðani vit settu búgv, hava vit bakað breyð sjálvi. Tó hevði tað ein heilt serligan týdning fyri okkum, tá ið vit í 1993 fluttu til Svøríkis at búgva. Har eru matvanarnir øðrvísi, har tey tvær heitar máltíðir um dagin og hava bert hvítt breyð. Tað dámdu okkum ikki, tí

# Eigur ikki at

**Ongin ivi er um, at føroysk handilsfólk leggja tað oman á prísin, sum fólk vilja gjalda, sigur Hermann Oskarsson, stjóri á Hagstovu Føroya. Hann vísir á, at vantandi kapping er orsøkin til høga prísstøðið her á landi**



*Fyri brúkaran er tað líka feitt, um tað er ein ella annar, sum fær ágóðan av dýru vørunum. Tí eftir standa vit við, at hvør vunnin króna er væl minni verd her í landinum enn í Danmark, sigur Hermanna Oskarsson, stjóri á Hagstovuni.*